FÓTBÓLTUR 2004

Sosialurin
Argjavegur 26
Postsmoga 76
FO-110 Tórshavn
Tlf. 341800
Teldupostur: post@sosialurin.fo
Heimasíða: www.sosialurin.fo

BLAÐSTJÓRN:
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

BLAÐFÓLK:
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

MYNDAMENN:
Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo
Jonhard Hammer
jonhard@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo
Maria Olsen
photo@mariaolsen.com
Finnur Justinussen
urfinn@hotmail.com
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

LÝSINGAR:
Durita Simonsen
durita@sosialurin.fo

ÚTGEVARI:
Sp/f Sosialurin

UMBRÓTING:
Sp/f Hestprent

PRENT:
De Bergske Blade

UPPLAG:
11.000

EVSTAMARK:
22. mars 2004

Endurgeving av tilfari úr hesum blaði er bert loyvd við loyvi frá útgevaranum.

# Hundrað ára gomul feløg og nýggjar tíðir

**Tveir av áhugaverdu spurningunum undan nýggja kappingarárinum eru, hvussu tey bæði feløgini, sum seinni í ár fara at halda eitt hundrað ára stovningardagar, fara at standa seg, og hvussu ætlanin at avmarka innflytingina av fremmandari arbeiðsmegi fer at síggjast aftur í styrkismuninum millum feløgini**

**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*



*HB og KÍ standa á jøvnum við hvør sínum 17 FM-heitum í 1. deild. Bæði feløgini verða væntandi við í kappingini í oddinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fótbólturin er farin á rull, og tað verður ikki helmað í aftur fyrrenn í oktober mánaði. Landskappingar, steypakappingar, Europa Cup, landslið og so mangt annað fótbóltinum viðvíkjandi fer næsta stóra hálva árið at vera við til at seta dagsskránna í fjølmiðlunum og í tosinum millum sera fótbóltshugaðu føroyingarnar.

24. august verður KÍ eitt hundrað ár, og 17. oktober fer HB um tey eitt hundrað. Síðani í 1942 hevur verið spælt um FM heitið í fótbólti á hvørjum ári burtursæð frá í 1944, tá ið kappingin varð avlýst, tí tað orsaka av krígnum ikki bar til at fáa fatur á bóltum at spæla við. Einastu feløgini, sum hava verið við øll árini eru javnaldrarnir KÍ og HB.

Síðst í apríl verður farið undir 62. kappingina um FM heitið. Hagtølini siga, at tað eru KÍ og HB, sum hava vunnið mest. Tá ið HB í fjør vann meistaraskapin fyri seytjandu ferð,løgdu havnarmenninir seg upp á síðuna av klaksvíkingunum. Ein sera áhugaverdur spurningur er, um tað fer at eydnast øðrum av hesum báðum feløgunum at seta nýtt met, ella um tað verður okkurt av hinum feløgunum, sum fer at spæla teimum báðum mest vinnandi feløgunum eitt puss.

Bæði KÍ og HB hava fyrireikað seg til stóra setningin, sum er at vinna meistaraskapin. Felags fyri feløgini er, at tey hava danskar venjarar, og tað er eisini felags, at tey, sammett við tey flestu av hinum feløgunum, hava nógv fólk at velja ímillum, sjálvt um einstakir av mest eyðsýndu spælarunum, sum spældu við í fjør, eru farnir av landinum at royna fótbóltseydnuna.

Í Klaksvík hava teir roynt at leggja alt tos um góðar vánir fyri at vinna meistaraskapin burtur. Í HB eru teir heldur ikki serliga fegnir at verða gjørdir til favorittar.

Størsti avbjóðarin til tey bæði hundrað ára gomlu tykist fara at verða B36, sum er tað felagið, ið ivaleyst hevur royndastu manningina.

## Ásetingarnar

Hvussu kappingin frá hinum feløgunum við tey stóru fer at verða, valdast nógv um, hvussu tað verður við fremmandu spælarunum. Hervið eru vit frammi við seinna stóra og nýggja spurningin undan hesum kappingarárinum.

Tað er einki at tosa um, at smeiturin av møguligum avmarkingum verður størstur í feløgunum úti kring landið. Her verður eitt nú hugsað um støðuna hjá VB, Skála, EB/Streymi og NSÍ, sum øll hava spælarar aðra staðni frá enn úr Norðurlondum.

Í útgangsstøðuni verður ofta roknað við, at felagið, sum í fjør flutti upp, og feløgini, sum í fjør stríddust fyri at sleppa undan niðurflytingini, fara at verða fremstu evini til niðurflytingarplássið. Gongdin í fjør vísti, at tað ikki altíð er soleiðis. Støðug feløg í bestu deildini nógvu tey seinastu árini – hevur verður hugsað um GÍ og VB – vóru leingi niðri ímóti botninum, meðan EB/Streymur stóð seg betri, enn teir nakrantíð hava gjørt. ÍF er nýggja liðið í bestu deildini, og meistarafelagið frá 1979 tykist ikki ætla sær bara at vera kanónføði.

Bólkaumfarið í kappingini um løgmanssteypið verður av feløgunum roknað sum besti møguleikin at fyrireika seg til landskappingina. Nýggir spælarar verða royndir, aðrir verða settir í nýggjar ódnir, og í onkrum feløgum verður bíðað eftir spælarum, sum fara at tørna til, tá ið landskappingin verður á skránni. Tí nýtast úrslitini í bólkaumfarinum ikki at vera greið ábending um, hvussu liðini fara at standa seg í landskappingini. Men tað er sjón fyri søgn, at B68 tykist vera verri fyri í ár, enn teir vóru í fjør, tá ið teir leingi vóru við í kappingini um meistaraskapin og enn eina ferð vunnu bronsukrónur.

Undir øllum umstøðum er lagt upp til eitt spennandi kappingarár. Tað verður ikki minst krydrað við stóru avbjóðingunum, tá ið landsliðið skal royna seg ímóti stórum fótbóltstjóðum við fronsku heimsstjørnunum á odda.

**Gott 2004 fótbóltsár!**

Sosialurin



